Havnar leksikon:

# Fyrsta »Fish  Chips« matstovan í Havn

Fyrstu »Fish & Chips« matstovuna í Havn læt Johan Petur Nielsen (1914-1973) upp í 1940. Johan Petur Nielsen var føddur á Eiði.

Fyrstu árini helt hann til í húsunum hjá Karl Johan Mikkelsen í Villumsgøtu, og í 1942 flutti hann oman í Tróndargøtu. Í 1944 gavst Johan Petur við hesum virksemi. Seinni flutti hann til Danmarkar at búgva.

»Fish & Chips« matstovan í Tróndargøtu var í húsunum, har pílurin vísir (uttast til vinstru). Seinni keypti Martin Andreasen húsini, og vórðu tey flutt niðan á Konmansmýri. Adressan er í dag Mýrisnípuvegur 13. Hinumegin vegin sæst bakarakringlan hjá Køkubúðini v. Andreas Jacobsen.

Innsettu myndirnar: Húsini í Villumsgøtu (tey sum pílurin vísur á. Myndin tikin frá Varðagøtu). Johan Petur Nielsen (1914-1973).

Um hetta mundið læt Henry Olesen eisini upp eina fish & chips matstovu í D.R. Jacobsensgøtu. Talan var um »Restaurant V« (Victory), so Havnin var væl fyri við fish & chips matstovum undir krígnum.



***Myndaeigarar:***

*Høvuðsmyndin:*
*Edle Bjørk*

*Húsini í Villumsgøtu:*
*Føroya Fornminnissavn*

*Myndin av Johan Petur Nielsen:*
*Kathrina Mikkelsen*

# Fyrsti almenni svimjihylurin í Havn



Myndin er av fyrsta almenna svimjihylinum í Havn. Í 1930 tók býráðið í Havn av einum tilboði frá Óla Jákup Hansen, Jacob Hansen og Niels Arge, upp á bygging av einum svimjihyli. Tilboðið var upp á kr. 3.185. Hylurin varð liðugur sama ár, og dýpdin var 2-6 metrar.

Árið eftir, í 1931, vóru skiftirúmini og trappan niður í hylin gjørd. Kostnaðurin var 1.400 krónur. Peningurin kom inn á henda hátt: Ein av stigtakarunum, Absalon Joensen, fotografur, skipaði fyri eini myndaframsýning, har tað kostaði 25 oyru at koma inn. Inn komu tilsamans 100 krónur. Býráðið læt 600 krónur, og tær írestandi 700 krónurnar komu inn við ymiskum innsavningum og tiltøkum.

Hesin svimjihylurin var í nýtslu til 1949, tá avgjørt var at lata hann aftur. Myndin er tikin á ólavssøku í 1932.

Í 1953 byrjaði arbeiðið upp á nýggjan svimjihyl í Gundadali. Hesin varð tikin í nýtslu í 1959. Í dag er Badmintonhøllin bygd oman yvir tann svimjihylin.

Tað vil siga, at havnarfólk høvdu ongan svimjijyl í 10 ár, frá 1949-1959.

Innsetta myndin er av fyrsta svimjihylinum og umhvørvinum í Gundadali.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.

*Myndaeigari:*
*Føroya Fornminnissavn*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddа barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýføдda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 34 18 00**

Sosialurin

**90 ár**

Týsdagin 5. apríl fyllir Signhild Danielsen í Havn 90 ár. Tey sum ynskja at heilsa upp á Signhild eru vælkomin í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, millum kl. 17-21.

**Dagurin**

**5. apríl. Irene,** deyð umleið ár 300. Tikin av døgum saman við tveimum systrum. Navnið merkir *friður*.